tí uttan eitt gott blað, eingin livandi flokkur.


— Vit hava roynt at geva blaðnum eitt snið, sum ikki bara tiltalar, men eitt blað, sum gevur veruliga mynd av tí, sum fer fram í samfelagnum, sum gevur eina politiska vitan, sum samsvarar og styðjar javnaðarrørsluna.

— Men vit kundu ikki sagt hetta, um ikki tey mongu, sum stuðlað hava blaðið við mánaðarligum inngjøldum. Tað er hetta, sum hevur gjørt, at vit kunnu gera tað blað, vit siggja hvønn mikudag og leygardag.

— Framhaldandi stuðul frá tykkum og vónandi nógvum fleiri aftrat, er framvegis ein treyt.

— Prentsmiðjuna læstu vit fyri einum ári síðani, 1. april 1977, hon er síðani seld til Einar Joensen, prentsmiðjumeistara, sum nú rekur hana.

— Flokkurin stendur við skuld, sum ikki er umfatað av blaðsins dagliga rakstri — og skal henda skuld fáast burtur, má blaðið verða stuðlað við beinleiðis tilskoti frá »donorum« nakað framyvir.



Veitslan var góð. Á myndini Einar Waag, sum ikki helt seg aftur frá harmonikutónleikinum

— Men vit hava so mangan fyrr staðið við trupulleikunum, men við hjálp frá okkara fólki, sum ongantið troyttast, hevur tað hóast alt gingið.

— Sanniliga kunnu vit siga, at her hevur víst seg eitt sinnalag, sum samsvarar við javnaðarhugsjónina, at hjálpa, har neyðin er størst.

Organisasjónin

Landsfundurin viðgjørdi eisini sjálva floksorganisasjónina. Vit hava ikki nóg gott apparat, sum kann røkja tær uppgávur, sum eru neyðugar fyri ein livandi flokk.

Tí skal nú skipast floksskrivstova, sum skal vera tað amboð, sum skal taka sær av teimum málum, sum hoyra undir slíka stovu. Skrivari floksins og virkisleiðari blaðsins koma at arbeiða viðari við loysnini av hesum spurningi.

Veitslan

Leygarkvøldið kom landsfundarfólkið saman til døgurða. At gera góðan mat — har var fesk súpan og oksasteik, ísur og kaffi omaná — dugur Petur Mohr, meisrarakokkur má hann vera. Borðhaldið mundi vera av teimum, sum mugu sigast at vera einastandandi. Har var valla andarhald millum tær mongu, stuttu og fyndigu røðurnar og sangirnar. Har var fólk komið úr øllum valdømum, yngri sum eldri, elstur mundi Einar Waag vera, Jóannes á Kjalnesi honum næstur. Hýrurin var hin besti. Ikki var hann minni, tá Hans J. Hansen kom við harmonikuni og sínum sermerkta sangi við vísum, hann sjálvur hevur yrkt.

— — —

Ein landsfundur, sum gav gott treysti til framhaldandi stríð fyri teimum hugsjónum javnaðarflokkurin framvegis vil virka fyri til frama fyri føroyska fólkið.

Framhald frá síðu 8

útgerð ella øðrum, kundu teir fáa íløgustuðul ella alment veðhald til útbyggjan av sínum virkjum. Hinir flokkarnir fingust ikki so langt, at tað almenna beinleiðis skuldi taka tað fyrsta stigið.

Hetta fekst tó í lag á øðrum økjum, har tað varð heimilað tí almenna at taka stig til útbyggjan av samfelagnum eitt nú innan ídnað, við at fara upp í virkir ella at seta á stovn virkir. Hetta hevur eisini í ein ávísan mun verið nýtt undir hesi samgonguni.

Tað, sum eg unirstrikaði við setanini av landsfundinum var týdningurin av at tað hevur verið javnaðarflokkurin, sum hevur staðið á odda í samráðingunum um tey broyttu vinnuviðurskiftini — at tað var hesin politikkur, sum flokkurin fyri mongum árum síðani stakk út, tann sokallaða samráðingarleiðin, sum vann frama. Samráðingar har roynt varð at tryggja føroyingum mest møgulig rættindi í egnum sjógvi, uttan at missa meir enn neyðugt á øðrum leiðum.

At hesin politikkur hevur verið hin beini, fingu vit eina vissu fyri á landsfundinum. Tað varð einmælt tikið undir við hesum politikki, og var eg persónliga ógvuliga glaður fyri hetta.

Ynski frá fundinum um at flokkurin beinleiðis kemur at stíla fyri á hesum øki framvegis og kemur at vera við í leiðsluni av okkara landi við avgerðandi ávirkan, tók ein sjálvsagt til eftirtektar. Sum ein trúgv hjá limunum uppá, at tað er so mangt, sum enn stendur á veikum føti, og sum tí ikki má koma undir ta lagnu, at tað sum ikki kann standa — má fella, men verður skynsamiliga vart og stuðlað til tað kann standa á egnum beinum somuleiðis.

Landsbanki

— Tú nevnir mál, sum eru við í samgonguskjalinum, og sum ikki eru framd. Hvørja meting hevur tú um, at hesi verða framd áðrenn valið?

— Sum eg segði frá á fundinum, so var júst dagin fyri landsfundin endalig prinsipptilsøgn fingin frá donsku stjórnini um, at teir vildu medvirka í fremjanini av eini dagpeningaskipan. Hetta hevur verið samráðst um við stjórnina nú í tvey ár, og tilsøgnin er at skilja soleiðis, at frá 1. juli 1979 kemur dagpeningaskipanin at virka í praksis. Tað eru nakrar fáar samráðingar eftir um lutfallið í býtinum millum ríkið og landið og um tann partin, sum m øguliga verður álagt arbeiðsgevaranum at útvega til hesa skipan.

Um vit taka landsbankan, so hevur ein serkøn nevnd sitið og »kortlagt« hesi viðurskiftini. Eftir er nú at gera lógina og somuleiðis at finna semju um, hvussu stórar heimildir hesin bankin skal hava. Hetta arbeiði skal vera liðugt, áðrenn ólavsøkutingsetuna, soleiðis at lógin kann samtykkjast tá.

Annars vóru mong onnur mál á skránni — mál um arbeiðaraviðurskifti — um arbeiðaravernd. Flokkurin vil skorða á, at vit fáa eina 40 tíma viku, og her er tað gleðiligt at kunna siga, at tað er semja í samgonguni um, at fremja hetta í samráð við vinnufeløgini.

Av øðrum málum, sum koma til viðgerðar nú, er hækkan í barnafrádráttinum, ein samskipan av skúlaumsitingini, at fremja eina nýggja fólkaskúlalóg o.fl.

At ræða veljararnar

— Tá javnaðarflokkurin var í samgongu við m.a. sambandsflokkin, var av andstøðumonnum hildið fram, at flokkurin var ov borgarligur og somuleiðis sambandskur. Nú ljóðar frá andstøðumonnum, at flokkurin er vorðin ein ramur loysingarflokkur og nærmast kommunistiskur og summir gera hann ókristiligan. Hvørja viðmerking hevur tú til tað?

— Tað er greitt, at uppgávan hjá hinum flokkunum er at lata javnaðarflokkin í ein tílíkan búna, at hetta kann ræða veljarnar. Vit eiga at gera okkum heilt greitt, at javnaðarflokkurin til komandi val fer at standa einsamallur í valstríðnum, og vil fáa ákoyringar frá øllum síðum. Men við okkara greiða politiska stavnhaldi og sakligu argumentatión, hava vit einki at ræðast.

— Fer javnaðarflokkurin upp í næstu landsstýrissamgongu fyri ein og hvønn pris?

— Nei, so avgjørt ikki. Um fólk vilja hava javnaðarflokkin í landsstýrið skulu tey velja javnaðarflokkin. Tað hoyrdist ofta frá øðrum flokkum áðrenn seinasta val, at atkvøður til teirra vildu verða nýttar til samarbeiði við javnaðarflokkin, men her mugu vit minnast, at ein høvuðstreyt er at javnaðarflokkurin eisini fær stórt tal av atkvøðunum. Javnaðarflokkurin situr ikki í landsstýrinum av atkvøðunum til hinar flokkarnar.

Um javnaðarflokkurin skal í eina landsstýrissamgongu, skal hann hava dygt álit og helst enn størri álit frá veljarunum. Stendur hetta greitt, ivist eg ikki í, at undirtøkan millum fólk verður góð. Tí, tað er eingin ivi um, at javnaðarflokkurin er flokkurin, sum tænir fólki eins og landi okkara best. Hetta er flokkurin, sum gevur størstu trygdina fyri tí ríkasta lívinum hjá tí einstaka, sum tá ikki nýtist at kenna seg undir oki av nøkrum, men sum kennur seg frælsan við teimum avmarkingum, sum tæna heildini.

Vinnulívsgrunnur Føroya Banka

Úr grunninum verður veittur studningur

o.u. kr. 60.000,—.

Oyðubløð til umsókn fáast á øllum skrivstovum hjá P/f Føroya Banka.

Umsóknir verða at senda fyri 1. mai.

Samsvarandi viðtøkunum verður studningur givin til feløg ella einstaklingar, ið ætla at royna nýggjar vinnulívsmøguleikar, serstakliga í fiskivinnuni, so sum royndir við nýggjum veiðiháttum ella framvegan av nýggjum marknaði. Somuleiðis til hjálp til læru, bókliga ella praktiska, fyri dugnaligar fiskimenn ella keypmenn. Stuðul til keyp ella umvæling av førum, motorum ella fiskiamboðum verður ikki veittur.

NEVNDIN

Heldur tú ikki **sosialin**



Vit ferma

hvønn mánadag og týsdag	í Ålborg
hvønn mikudag	í Halmstad
hvønn hósdag	í København

2. hvørja viku í Larvik	(næstu ferð 17/4)
3. hvørja viku í Ålesund	(næstu ferð 17/4)
3. hvørja viku í Sandnes	(næstu ferð 7/4)
4. hvørja viku í Blyth	(næstu ferð 18/4)
í Antwerpen	

til Føroyar

Frystikontainarar eins væl og vanligir kontainarar eru tøkir

AVGREIÐSLUR:

Chr. Jensen, tlf. 122566 Ålborg
A/s Traderline, tlf. 203311 København
Wilson & Co., tlf. 18135 Halmstad
Bugge & Olsen, tlf. 82090 Larvik
J. Hagenæs, tlf. 24078 Ålesund
T. Schancke Olsen, tlf. 66028 Sandnes
W. Harney & Co., tlf. 2331 Blyth

BOX 17 TLF. 13960 TELEX 81236 TRADER TÓRSHAVN